# Bill ongar ætlanir um at senda sjúklingar aðrastaðni enn til Danmarkar

**- Verða sjúklingar sendir aðrastaðni enn til Keypmannahavnar, hevur tað við sær eykaútreiðslur fyri føroyska sjúkrahúsverkið vegna ferðing og uppihald. Skal tað loysa seg fíggjarliga at senda sjúkingar aðrastaðni enn til Keypmannahavnar, skal sjálv viðgerðin vera tilsvarandi bíligari, sigur landsstýrismaðurin, Bill Justinussen, sum ætlar sær at kanna aðrar møguleikar**

SJÚKUVIÐGERÐ
*Vilmund Jacobsen*

Bill Justinussen, landsstýrismaður, fer í dag at svara Rúnu Sivertsen, løgtingskvinnu, uppá fyrispurningarnar, hon setti landsstýrismanninum herfyri. Fyrispurningarnir, sum vóru fýra í tali, snúðu seg um viðgerð av føroyskum sjúklingum á sjúkrahúsum uttanlands.

### Eftirkanningar

Í fyrsta lagi spurdi løgtingskvinnan, um landsstýrismaðurin hevur trygd fyri, at tær eftirkanningar, sum Ríkissjúkrahúsið kallar inn til, veruliga eru neyðugar og bara kunnu gerast á Ríkissjúkrahúsinum.

Í svarinum vísir landsstýrismaðurin á, at sambært løgtingslóg um Sjúkrahús Føroya, eru tað yvirlæknarnir, sum hava heimild at senda sjúklingar til viðgerðar í Danmark.

- Hetta fer fram á tann hátt, at yvirlæknin skrivar eina sokallaða "kautión" til ávísar deildir á donskum sjúkrahúsum. Kautiónin varar vanliga í mesta lagi í eitt ár. Er hon galdandi í stytri enn eitt ár, verður hetta tilskilað. Um sjúklingurin skal til eftirkanningar í tíðarskeiðinum, kautiónin er galdandi, er tað yvirlæknin í føroyska sjúkrahúsverkinum sum avgerð, um føroyska sjúkrahúsverkið rindar ferða-og uppihaldsútreiðslurnar til eftirkanningina.

Svarið er tí, sigur Bill Justinussen, at landsstýrismaðurin hevur ta trygd, sum er ásett í sjúkrahúslógini, t.e. at kautionerandi yvirlæknin í føroyska sjúkrahúsverkinum tryggjar, at eftirkanningarnar veruliga eru neyðugar.

- Um hesar kanningar bert kunnu gerast á Ríkissjúkrahúsinum, er ein spurningur, sum Trivnaðarmálaráðið arbeiðir við.

Sambært landsstýrismanninum verður kannað, hvat skal til fyri at gera ávísar viðgerðir og eftirkanningar, sum nú verða gjørdar uttanlands, í føroyska sjúkrahúsverkinum.

- Skulu sjúklingar uttanlands til eftirkanningar, verður hetta gjørt annaðhvørt á tí staði, har teir upprunaliga eru viðgjørdir ella á tí staði, har nøktandi eftirkanning kann gerast bíligast, sigur Bill Justinussen.

### Eftirlit

Í øðrum lagi spurdi Rúna Sivertsen, hvat eftirlit er við, at mest møguligt fæst fyri peningin, sum føroyska heilsuverkið rindar Ríkissjúkrahúsinum.

Landsstýrismaðurin sigur, at kannað verður eftir, at rokningarnar samsvara við kautiónirnar, sum eru givnar.

- Ætlanin er at styrkja hetta eftirlit frá februar 2003, soleiðis at eitt fólk verður sett á Sjúklingahotellinum Tórshavn, sum skal kanna útgreinaðu rokningarnar fyri at vita, um samsvar er ímillum einstøku veitingarnar, sum goldið verður fyri og tær veitingar, vit í veruleikanum fáa.

Landsstýrismaðurin segði, at hugt fer m.a. at verða eftir, um seingjadagatalið á rokningini samsvarar við innleggingartíðina.

Í triðja lagi spurdi løgtingskvinnan, nær føroyskir sjúklingar fara at verða sendir til bestu viðgerðarstøð í heiminum.

- Eg havi ta áskoðan, at so stórur partur sum gjørligt av tí peningi, sum nýttur verður til serviðgerðir uttanlands, skal nýtast til sjálva viðgerðina, og at peningur til til ferðing og uppihald skal avmarkast mest møgulig.

Landsstýrismaðurin heldur eisini, at viðgerðin skal keypast, har hon er nøktandi, bæði hvat viðvíkur dygd og prísi.

- Hvørji bestu viðgerðarstøðini í heiminum eru, eru óivað nógvar meiningar um, men eg haldi meg til, at Sundhedsstyrelsen, sum er fakligi eftirlitsmyndugleikin í danska og føroyska heilsuverkinum, veitir trygd fyri, at dygdin á viðgerðunum á donskum sjúkrahúsum er í lagi.

### Eykaútreiðslur

Bill vísir á, at sum er, er besta og bíligasta ferðasambandið við flogfari ímillum Føroyar og Keypmannahavnar. Harafturat hevur føroyska sjúkrahúsverkið frammanundan Sjúklingahotellið í Keypmannahavn, sum í 2001 kostaði umleið 9,6 milj. kr. ella 498 kr. fyri hvønn seingjadag við teimum 19.483 seingjardøgunum, sum tá vórðu.

- Verða sjúklingar sendir aðrastaðni enn til Keypmannahavnar, hevur tað við sær eykaútreiðslur fyri sjúkrahúsverkið vegna ferðing og uppihald. Skal tað loysa seg fíggjarliga fyri sjúkrahúsverið at senda sjúkingar aðrastaðni enn til Keypmannahavnar, skal sjálv viðgerðin vera tilsvarandi bíligari.

Landsstýrismaðurin leggur aftrat, at Trivnaðarmálaráðið á Ríkissjúkrahúsinum hevur eina avsláttarskipan tengda at nýtsluni á Ríksissjúkrahúsinum, og soleiðis fekk føroyska sjúkrahúsverið í 2001 ein avsláttur uppá 6,6 milj. kr. av teimum umleið 43 milj. kr., sum vórðu nýttar til serviðgerðir á Ríkissjúkrahúsinum hetta árið.

Bill hevur tískil ongar ítøkiligar ætlanir um at senda sjúklingar aðrastaðni enn hagar, teir verða sendir nú. Hinvegin ætlar landsstýrismaðurin at kanna aðrar møguleikar.

- Vísir tað seg, at onnur viðgerðarstøð kunnu veita somu ella betri tænastu til sama ella lægri kostnað enn Ríkissjúkrahúsið, tá ið ferða - og uppihaldsútreiðslur eru íroknaðar, verður hetta tikið upp til viðgerðar.

Í viðmerkingum sínum til fyrispurningin, segði løgtingskvinnan, at vit óivað høvdu fingið eina betri tænastu og meira fyri peningin, um støða í hvørjum einstøkum føri varð tikin til, hvar mest hóskandi viðgerðarstaðið er.

Men her er landsstýrismaðurin ikki heilt samdur.



*- Ein fyritreyt fyri at fáa avsláttur til sjúkuviðgerðir, er oftast, at ein ávís mongd verður keypt. Verða viðgerðirnar spjæddar á fleiri viðgerðarstøð, fer tað at hava við sær ein lægri mongdaravsláttur, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður*

- Ein fyritreyt fyri at fáa avsláttur, er oftast, at ein ávís mongd verður keypt. Verða viðgerðirnar spjaddar á fleiri viðgerðarstøð, fer tað at hava við sær ein lægri mongdaravsláttur. Ein onnur fyritreyt fyri eini góðari tænastu til sjúklingin er, at samstarvsfelagarnir kenna hvønn annan og mannagongdirnar hjá hvørjum øðrum.

Bill vísir á, at sjúklingar tó í serligum føri verða sendir aðrastaðni enn til Ríkissjúkrahúsið, tí tænastan ikki finst á Ríkissjúkrahúsinum ella tí, hon er betri aðrastaðni.

- Seinnu árini er hetta praktiserað á tann hátt, at yvirlæknin ella sjúklingurin hava sent umbøn til Trivnaðarmálaráðið um aðra viðgerð enn hana, ið yvirlæknarnir sambært sjúkrahúslógini hava rætt til. Ráðið tekur í hvørjum einstøkum føri støðu til hesar umbønir, eitt nú eftir, at tær hava verið til hoyringar hjá fakfólki, sigur landsstýrismaðurin.

### Ongar kanningar

Í fjórða og seinasta lagi spurdi Rúna Sivertsen, um Almanna- og Heilsumálastýrið hevur gjørt kostnaðar-og nyttukanningar av sjúkuviðgerðum, ið neyðugar eru at gera uttanlands.

Landsstýrismaðurin heldur, at hesin spurningurin er torskildur og tí ikki so einfaldur at svara, men heldur tað vera ógvuliga trupult at gera kostnaðar-og nyttukanningar av sjúkuviðgerðum, tí tá verður ikki hugsað um kostnaðarpartin.

- Trupult er at meta um nyttuna av eini sjúkuviðgerð. Er tað samfelagsliga nyttan ella nyttan hjá tí einstaka og teimum avvarðandi? Hugsar løgtingskvinnan, um Trivnaðarmálaráðið hevur samanborið kostnaðin millum sjúkuviðgerð í Føroyum og uttanlands ella ímillum ymisk útlendsk viðgerðarstøð, er svarið, at ráðið hevur ikki gjørt eina tílíka kanning, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður, at enda í svarunum til Rúnu Sivertsen, løgtingskvinnu, um sjúkuviðgerðir uttanlands.

## Bekendtgørelse om Sygehusfælledskab

*Viðheft er: Bekendtgørelse nr. 1171 af 21/12/94 om Hovedstadens Sygehusfælledskab betaling til amtkommunerne, Københavns og Frederiksberg kommuner samt Førøernes og Grønland Hjemmestyre*

Bekendtgørelse om Hovedstadens Sygehusfællesskabs betaling til amtskommunerne, Københavns og Frederiksberg kommuner samt Færøernes og Grønlands Hjemmestyre
BEK nr 1171 af 21/12/1994 (Gældende)
Lovgivning som forskriften vedrører:
LOV Nr. 1132 af 21/12/1994
Senere ændringer til forskriften:
BEK Nr. 477 af 03/06/1997

**Bekendtgørelse om Hovedstadens Sygehusfællesskabs betaling til amtskommunerne, Københavns og Frederiksberg kommuner samt Færøernes og Grønlands Hjemmestyre**

I henhold til § 8, stk. 4 i lov nr. 1132 af 21. december 1994 om Hovedstadens Sygehusfællesskab fastsættes:

**§ 1.** Hovedstadens Sygehusfællesskab betaler i hvert af årene 1995 og 1996 et beløb til amtskommunerne, herunder Københavns og Frederiksberg kommuner, og Færøernes og Grønlands Hjemmestyre.

*Stk. 2.* Det i stk. 1 nævnte beløb beregnes som summen af følgende beløb:

- 1) Den del af Rigshospitalets driftsbevilling, der i 1993 medgik til nedbringelse af amtskommunernes, Københavns og Frederiksberg kommuners samt Færøernes og Grønlands betaling for hospitalets ydelser, eksklusive reduktionen til Rigshospitalets lokalområde i Københavns Kommune samt eksklusive værdien af Bornholms Amtskommunes frie indlæggelsesret i 1992, jf. § 3. Beløbet pris- og lønreguleres årligt.
- 2)Beregnet forrentning og afskrivning af investeringer foretaget på Rigshospitalet i henhold til statslige bevillinger frem til og med finansloven for 1992 og af de faktiske investeringer i 1993.
- 3) Beregnet forrentning og afskrivning af mindre byggearbejder på Rigshospitalet inden for en årlig ramme på 11 mio. kr. i 1992 pris- og lønniveau. Beløbet pris- og lønreguleres årligt.
- 4) Beregnet årlig pensionsbyrde.

*Stk. 3.* Det efter stk. 2 beregnede beløb fordeles dels til Københavns og Frederiksberg kommuner, dels under et til de øvrige myndigheder, der er nævnt i stk. 1, på grundlag af værdien af deres forbrug af ydelser, eksklusive særydelser, på Rigshospitalet i 1994.

*Stk. 4.* Det i stk. 3 nævnte beløb til de øvrige myndigheder fordeles til de enkelte amtskommuner samt Færøernes og Grønlands Hjemmestyre efter den enkelte sygehusmyndigheds forbrug, eksklusive særydelser, på Rigshospitalet i det pågældende år.

**§ 2.** Hovedstadens Sygehusfællesskab betaler fra og med året 1997 hvert år et beløb til amtskommunerne, herunder Københavns og Frederiksberg kommuner, og Færøernes og Grønlands Hjemmestyre.

*Stk. 2.* Det i stk. 1 nævnte beløb beregnes som:

- 1) Det i § 1, stk. 2 nævnte beløb.
- 2) Herfra trækkes det beløb, som Rigshospitalets takster i 1996 er forhøjet med i forhold til rent omkostningsbestemte takster i 1996 for at opnå et uændret takstniveau ved uændret aktivitet. Beløbet pris- og lønreguleres årligt. Beløbet beregnes for 1997 på grundlag af det budget, der lægges til grund for Rigs-hospitalets takstfastsættelse for 1996. Der sker i 1998 en efterregulering af beløbet på grundlag af Rigshospitalets regnskab for 1996. Beløbet beregnes i 1998 og følgende år på grundlag af Rigshospitalets regnskab for 1996.

*Stk. 3.* Det efter stk. 2 beregnede beløb fordeles i henhold til bestemmelserne i § 1, stk. 3 og 4.

**§ 3.** Hovedstadens Sygehusfællesskab betaler hvert år udover de beløb, der følger af §§ 1 og 2, et beløb på 60,0 mio. kr. i 1994 pris- og lønniveau til Bornholms Amtskommune. Beløbet pris- og lønreguleres årligt.

**§ 4.** Det efter § 1, stk. 3 og § 2, stk. 3 beregnede beløb til Københavns og Frederiksberg kommuner indgår i finansieringen af Hovedstadens Sygehusfællesskab.

*Stk. 2.* Betalingen til de enkelte amtskommuner, hvormed Hovedstadens Sygehusfællesskab indgår benyttelsesaftaler, samt Færøernes og Grønlands Hjemmestyre sker på grundlag af de indgåede aftaler om benyttelse af Rigshospitalet. Beløbene fratrækkes med en tolvtedel fra de månedlige regninger, som udsendes.

*Stk. 3.* For amtskommuner, der ikke har indgået aftale om benyttelse af Rigshospitalet, sker en foreløbig afregning af beløb for det pågældende år senest den 31. december på grundlag af det forventede forbrug.

*Stk. 4.* Inden den 1. marts det følgende år foretages en efterregulering beregnet på grundlag af den enkelte amtskommunes samt Færøernes og Grønlands Hjemmestyres faktiske forbrug på Rigshospitalet.

**§ 5.** Bekendtgørelsen træder i kraft den 1. januar 1995.

*Sundhedsministeriet,*
*den 21. december 1994*
Yvonne Herløv Andersen
/ John Erik Pedersen



# Hava tosað um tiltøk fyri at bøta um trygdina

**Bátar og skip undir Føroyum eru hervilig at seta trygdina til viks, men tosað hevur verið um samstarv ímillum Fiskiveiðieftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið fyri at koma tí til lívs**

TRYGD Á SJÓNUM
*Áki Bertholdsen*

Fiskiveiðieftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið hava av og á tosað um, hvussu tað ber til at bøta um trygdina á sjónum.

Tað er ein vaksandi trupulleiki, at sjómenn og útróðrarmenn seta trygdina til viks, serliga á summum økjum. Tað, sumn hugsað verður um i hesum føri, er, tann parturin av trygdini, sum hevur við radiosamskiftið at gera.

Í blaðnum í gjár segði samskiparin á Fjarskiftiseftirlitinum, Don Petersen, at tað vóru fleiri og fleiri bátar, sum ikki høvdu kravdu vhf-útgerðina umborð, men tað er eisini vanligari og vanligari, at menn ikki duga at brúka útgerðina, hóast hon er umborð.

Á Fiskiveiðieftirlitinum eru tey ikki ósamd í hesum at tað er ein trupulleiki, at trygdin verður skúgvað til viks.

Men eftir øllumat døma upplivir Fiskiveiðieftirlitið trupulleikan eitt sindur øðrvísi enn Fjarskiftiseftirlitið.

Elmar Højgaard sigur, at tað mest eru størri bátar og skip, sum Fiskiveiðieftirlitið kannar. Hinvegin sigur Fjarskiftiseftirlitið, at tað serliga eru teir opnu bátarnir, har trupulleikar eru.

Elmar Højgaard, leiðari, sigur, at tað, sum Fiskiveiðieftirlitið hevur eftirlit við, er, um útgerðin er umborð.

– Tað er ikki okkara borð at kanna eftir, um menn eisini hava tað kravda vhf-prógvið, ella um teir annars duga at brúka útgerðina, sigur hann. Tað er ábyrgdin hjá Fjarskiftiseftirlitinum.

Trupulleikin hjá Fiskiveiðieftirlitinum er fyrst og fremst, at bátar og skip svara ikki aftur, tá ið kallað verður á tey.

– Tað er mangan ómetaliga trupult at fáa samband við bátar og skip, hóast tað er kravt, at tey skulu lurta eftir rás 16, sigur Elmar Højgaard.

– Men tað tykist sum um at teir gloyma at lurta, og tað kann fáa óhepnar avleiðingar, tekur ein neyðstøða seg upp.

Hann sigur, at teir hava lagt til merkis, at støðan versnaði í so máta, tá ið fartelefonin kom, tí tað tykist sum um menn dúva heldur upp á fartelefonina, hóast tað er kravt, at teir skulu lurta eftir rás 16 á vhf.

Annars heldur hann, at tað stendur heilt hampiliga væl til við aðrari trygdarútgerð, sum er kravd umborð á bátum og skipum, í hvussu so er teirri útgerðini, sum hevur mestan týdningin.

– Tað er rár hending, at vit koma framá bátar, sum meiri og minni eru skrædlaðir fyri útgerð, sigur hann.

### Tosa um avtalu

Elmar Højgaard sigur, at onkuntíð hevur verið tosað um at fáa eitt samstarv í lag ímillum Fiskiveiðieftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið um hesi viðurskiftini.

– Vit hava tosað um, at vit skulu kanna eftir, um menninir umborð á bátum og skipum hava kravda vhf loyvi, tá ið vit kortini eru umborð og gera ymsar kanningar.

Men fyribils er tað ikki vorðið til meiri enn tos. Tó heldur hann, at tað skuldi ikki verið so trupult at fingið eina slíka avtalu í lag um tað, so skuldi tað ikki staðið á Fiskiveiðieftirlitinum at kanna tað eisini.

Spurningurin er so, hvat skal henda við teimum, har neyðugu vhf- loyvini ikki eru umborð, um Fiskiveiðieftirlitið skal fáa heimild til at senda slíkar bátar til lands, men tað fær Elmar Højgaard ikki svara uppá enn.

Men í øllum førum heldur hann, at teir bátar og tey skip, sum ikki svara á rá s 16, tá ið fiskiveiðieftirlitið kallar á teir, áttu at fingið bót.



*Tað er mangan ógvuliga trupult at fáa samband við bátar og skip, hóast tað er kravt, at teir skulu lurta eftir rás 16 á vhf-sendaranum, sigur Fiskivieiðieftirlitið*
*Myndin er tilvildarlig*